# BankNordik broytir rentur og prísir

*Rentan á innláni hjá privatkundum verður broytt, og samstundis verður upphæddin, sum er undantikin negativari rentu, eisini broytt. Broytingarnar verða gjørdar av handilsligum ávum.*

Broytingin hevur við sær, at rentan á innláni hjá privatkundum verður broytt frá -0,60% til -0,75% galdandi frá 16. august 2021. Upphæddin, sum er undantikin negativari rentu, verður samstundis broytt til 150.000 kr.

Til ber at hava tríggjar vanligar innlánskontur uttan at gjalda negativa rentu, um upphæddin á kontunum ikki fer upp um ávikavist 100.000 kr., 25.000 kr. og 25.000 kr. Fer upphæddin á hesum kontum upp um ásettu mørkini, skal kundin gjalda negativa rentu á -0,75% av tí upphædd, sum fer upp um markið. Um kundin hevur fleiri enn 3 innlánskontur, verður negativ renta goldin av hesum kontum.

**Pensjónskonta**
16. august 2021 verður rentan á pensjónskontum eisini broytt frá -0,60% til -0,75%, og hetta er galdandi frá fyrstu krónu.

**Børn og ung undantikin**
Børn og ung undir 29 ár eru undantikin negativum rentum, og broytingarnar, sum eru nevndar her, eru sostatt ikki galdandi fyri kundar undir 29 ár.

**Samansparingarkonta við 0% í rentu**

Sum nakað nýtt bjóða vit nú samansparingarkontu við 0% í rentu á innláni millum 100.000 kr. og 5.000.000 kr.

Samansparingarkontan hevur 12 mánaðar uppsøgn, og í minsta lagi 100.000 kr. skulu setast inn á kontuna.

## Broyttir prísir

Av handilsligum ávum broytir BankNordik niðanfyri nevndu prísir frá 16. august 2021.

| Frágreiðing | Prísur í dag | Nýggjur prísur |
|---|---|---|
| Árligt kontugjald – gjaldoyrakonta | 100 | 500 |
| Útgjald við kassan | 25 | 50 |
| Inngjald á egna kontu, privat | 25 | 50 |
| Keyp og søla av gjaldoyra í reiðum peningi | 75 | 100 |
| Vanlig flyting, framd av bankanum | 50 | 75 |
| Vanlig flyting umbiðin umvegis telefon, teldupost e.l. (verður bert gjørt í serligum føri og eftir avtalu við bankan) | 60 | 85 |
| Skundflyting umbiðin umvegis telefon, teldupost e.l. (verður bert gjørt í serligum føri og eftir avtalu við bankan) | 90 | 100 |
| Skundflyting, framd av bankanum | 80 | 100 |
| Gjalding við inngjaldskorti/girokorti, framd av bankanum | 50 | 75 |
| Skundflyting, framd í Netbankanum, privat | 2 | 10 |
| Flyting sama dag í Netbankanum, privat | 2 | 5 |
| Flyting sama dag í Netbankanum til kontu í Føroyum, vinna | 2 | 5 |
| Gjalding við inngjaldskorti/girokorti, framd í Netbankanum | 0 | 5 |
| Flyting til kontu í Danmark í Netbankanum, vinna | 5 | 7 |
| Skundflyting til kontu í Danmark í Netbankanum, vinna | 7 | 10 |
| Skundflyting í Netbankanum til kontu í Føroyum, vinna | 2 | 10 |
| Gjald fyri lønarflyting, pr. lønarlinju | 20 | 40 |
| Gjald fyri afturføring av lønarflyting | 60 | 100 |
| Fastur lønarordri | 100 kr. + 20 kr. pr. linju | 100 kr. + 40 kr. pr. linju |
| Fast gjald fyri Netbanka til áhugafelag, pr. ársfjórðing | 50 | 75 |
| Útgjald í sjálvtøkum hjá BankNordik | 2 | 5 |
| Útgjald í sjálvtøkum hjá BankNordik – NordikBørn, NordikUng og NordikSolo | 1,5 | 5 |
| Útgjald í sjálvtøkum hjá øðrum peningastovnum | 5 | 8 |
| Útgjald av evrum í sjálvtøkum hjá BankNordik – NordikBørn, NordikUng og NordikSolo | 37,50 kr. + grundkostnað | 50 kr. + grundkostnað |
| Visa/Dankort, árligt kortgjald | 250 | 300 |
| Mastercard Debit Standard, árligt kortgjald | 250 | 300 |
| Mastercard kredittkort Standard uttan trygging, árligt kortgjald | 200 | 300 |
| Mastercard kredittkort Standard, árligt kortgjald | 400 | 500 |
| Mastercard kredittkort Gull, árligt kortgjald | 950 | 1.100 |
| Mastercard kredittkort Gull familjukort, árligt kortgjald | 300 | 400 |
| Mastercard kredittkort Platinum familjukort, árligt kortgjald | 400 | 500 |
| Business Mastercard Standard kredittkort, árligt kortgjald | 400 | 500 |
| Business Mastercard Gull kredittkort, árligt kortgjald | 950 | 1.100 |
| Broytingar í VP-goymslu, transaktiónsgjald | 18 | 20 |
| Fráboðanarskriv í sambandi við VP-goymslu | 15 | 20 |
| NordikPensjónsRøkt umsitingargjald | 450 kr. | 0,65% av íløguupphæddini |
| NordikOgnarRøkt umsitingargjald | Kursvirðið < 2,5 mió kr. = 0,35%<br>Kursvirðið 2,5 mió–5 mió. kr. = 0,25%<br>Kursvirðið > 5 mió. kr. = 0,15% | 0,65% av íløguupphæddini |
| Kundaboks – lítil, árligt gjald | 800 | 1.000 |
| Kundaboks – stór, árligt gjald | 1.000 | 1.500 |

**banknordik.fo** Broytingarnar verða eisini at síggja á banknordik.fo/prisir, tá ið tær fáa gildi.